ATLANTIC AIRWAYS

SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**

Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 24:
Leiðin til Billund

8 síður við spennandi tilfari um summar



# **Legoland** gerst størri og størri

**Legoland kann bjóða ein heilan heim, sum bygdur av lego, sigur kunningarleiðarin hjá Legolandi, Anna Maria Kvist**

**BILLUND**

Legoland læt upp á fyrsta sinni í 1968, og 41 ár seinni er tað eitt miljónatal av børnum, sum hava vitjað stuttleikaparkina í Billund. – Vit kunnu bjóða børnunum ein heilan heim, sum er bygdur av legoklossum, og vit hava deilt stuttleikaparkina sundur í temaøki, so børnini kunnu flyta seg úr einum hugflogskendum heimi, og í ein annan, greiðir kunningarleiðarin hjá Legolandi, Anna Maria Kvist frá. Millum elstu og best umtóktu tilboðini hjá Legolandi, er ferðsluskúlin, sum námsfrøðiliga skal búgva børnini til at standa seg betri í ferðsluni.

## Nakað fyri øll

Kovboyarar eru eisini í Legolandi. - Vit hava eisini ein westernbý, sum eitur Legoredo Town. Fyri tey yngru hava vit eisini eitt sjórænaraland, har tað ber til at skjóta eftir hvørjum øðrum við vatnkanónum. Vit hava eisini Adventureland, Lego City og Miniland. Sjálv halda vit, at Minilandið er hjartað hjá Legolandi. Tað var har alt byrjaði. Ein miniaturheimur, har nógv av kendastu støðunum í Danmark eru endurgivin í einum miniformati. Um vit skulu framhevja hvar Legoland byrjaði, so vísa vit gjarna til Miniland. Anna Maria Kvist sigur, at tey í Legolandi leggja alstóran dent á, at børnini vera aktiveraði. – Tá ein t.d. flýgur við teimum smáu legoflogførunum, so er talan um eina karusel, har ein snúrar runt. Børnini sita við stýrisvølin, og kunnu ávirka gongdina. – Børnini gera av sjálv, hvønn túr tey vilja hava, staðfestir Anna Maria Kvist


Melda teg til Club Atlantic og

VINN FERÐASEÐLAR

og fá sertilboð sendandi við teldupostí

Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo